Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Uni Rasmussen, løgtingsmaður

Svarari: Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Um hædd er tikin fyri blindum og sjónveikum í nýggju bíleggingarskipanini hjá Strandfaraskipum Landsins

Spurningur:

Eru ætlanir um at gera tað møguligt hjá blindum og sjónveikum at bíleggja í nýggju bíleggingarskipanini hjá Strandfaraskipum Landsins?

Viðmerkingar:
Strandfaraskip Landsins hava bílagt eina nýggja bíleggingarskipan til bæði oyggja- og bygdaleiðir, sum væntandi kann setast í verk í 2022.
Tá ið tað almenna fer undir nýggjar verkætlanir er av týdningi, at tær rúma øllum borgarunum í landinum.
Í hesum førinum, tá talan er um nýggja bíleggingarskipan, so er av týdningi, at øll fáa ágóðan av henni, eisini blind og sjónveik.
Spyrjarin ynskir at fáa at vita, um hædd er tikin fyri blindum og sjónveikum í nýggju bíleggingarskipanini, sum Strandfaraskip Landsins hevur bílagt. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 15. oktober 2021

Uni Rasmussen